TJÓÐSAVNIÐ

# HEIÐAFUGLUR Í SKÚGVOY

# *Teljing av heiðafugli í 2024*

Jón Aldará, Leivur Janus Hansen



Í juni 2023 varð heiðafuglur taldur í Skúvoy. Hetta var 13. árið, at heiðafuglur er taldur um alla oynna, og 2. árið, at Tjóðsavnið umsitur verkætlanina.

## Endamálið

Endamálið við teljingini er, at á hvørjum ári skráseta og kortleggja øll reiðrandi heiðafuglapør í Skúvoy og harvið fylgja við stovnsgongdini hjá heiðafuglasløgunum. Heiðafuglur í hesum føri fevnir um hesi 9 sløg: skúgvur (*Stercorarius skua*), kjógvi (*Stercorarius parasiticus*), tjaldur (Haematopus ostralegus), spógvi (Numenius phaeopus), lógv (Pluvialis apricaria), mýrisnípa (Gallinago gallinago), steinstólpa (Oenanthe oenanthe), grátítlingur (Anthus petrosus) og summartítlingur (Anthus pratensis). Onnur sløg verða eisini tald eftir høvi. Teljingin byrjaði í 2010 og hevur undantikið í 2011 verið framd hvørt ár síðan og fram til 2023.

## Mannagongd

Teljingin verður gjørd seint í juni, tá øll fuglasløgini, ið eru fevnd av teljingini, hava egg ella ungar.

Høvuðsmannagongdin er gonguteljingin, sum hevur verið nýtt síðan 2010. Teljarin gongur aftur og fram í lendinum við 100-300 metrum millum gonguleiðirnar og skrivar fugl inn á kort. Fuglurin verður mettur at vera reiðrandi ella ikki-reiðrandi alt eftir atburði. Fyrimunurin við hesi teljing er, at tað ber til at skráseta næstan allan fugl, sum reiðrast, har sum gangandi er. Vansin er, at mannagongdin ikki ítøkiliga staðfestir, hvar teljarin skal ganga, og hvussu langa tíð hann skal telja. Hetta ger, at munir kunnu vera millum, hvussu teljingar eru framdar ymisk ár alt eftir hvør telur, og tískil kann hagfrøðiliga greiningin av tølunum gerast veik.

Aftrat gonguteljingin verður gjørd ein punktteljing, ið nevnist R250 og varð nýtt í oynni fyri fyrstu ferð í 2022. Her fer til teljarin til frammanundan útvaldar knattstøður, bíðar í 5 minuttir og skrásetur síðan í 10 minuttir allar einstakar fuglar innanfyri 250 metra radius. Samstundis skrásetir teljarin frástøðu og vinkul til hvønn fugl (við frástøðumátara og kumpass), og tilskrivar hvørjum fugli eitt ítøkiligt slag av atferð og/ella umstøðu, sum kann veljast á einum lista á skrásetingarblaðnum. Atferð og umstøður geva ábending um, hvørt fuglurin er reiðrandi ella ikki. Fyrimunurin við hesi teljing er, at hon er so óheft av teljaranum, sum til ber, og at hon staðfestir m.a. greitt, hvar teljarin er, tá hann telur, hvar fuglurin er í mun til teljaran, og hvussu leingi talt verður. Hetta ger, at teljingin kann endurtakast á júst sama hátt hvørt ár, og at tølini eru løtt at arbeiða við hagfrøðiliga. Vansin við R250 er, at hon kann ikki nýtast til at telja allan fuglin í oynni, og dáturnar kunnu tí ikki beinleiðis samanberast við tær frá teljingum áðrenn 2022.

Mannagongdin til gonguteljingina er útgreinað í 'Leiðbeining til teljing av heiðafugli í Skúvoynni á sumri' (Olsen 2018). Mannagongdin til R250-teljingina er útgreinað í 'R250 Breeding Bird Count" (Hansen & Aldará 2022).

## Virksemi

Í 2023 vórðu gonguteljingin og R250-teljingin gjørdar í senn, og fóru tær fram á døgunum 26., 27., 28. og 29. juni. Teljararnir vóru Jón Aldará og Silas Olofson.

## Úrslit

Í gonguteljingini vórðu allir hagapartar taldir í tíðarskeiðinum 26.-29. juni. Orsakað av vánaligum veðri vórðu bert ein partur av R250 ringunum taldir. Tilsamans bar til at telja 17 ringar (Mynd 1). Av hesi orsøk kunnu tølini frá R250-ringunum ikki samanberast við heildartølini frá gonguteljingini. Tó kunnu tey nýtast seinni í neyvari greining, sum ikki er fevnt av hesi frágreiðing.

Tøl fyri tey 9 heiðafuglasløgini frá báðum teljingunum síggjast í Mynd 3.



2022 2023

*Mynd 1: Tal av sløgum í R250-ringunum, sum vórðu taldir í Skúvoy í 2022 og 2023. Ljósast (gult) er hægsta tal og myrkast er lægsta tal.*



2022 2023

*Mynd 2: Tal av búpørum í R250-ringunum, sum vórðu taldir í Skúvoy í 2022 og 2023. Ljósast (gult) er hægsta tal og myrkast er lægsta tal.*




| | Skúgvur | Kjógvi | Tjaldur | Spógvi | Mýrisnípa | Lógv | Steinstólpa | Grátítlingur | Summar-títlingur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2022 | 50 | 34 | 38 | 19 | 30 | 13 | 71 | 58 | 4 |
| 2023 | 47 | 40 | 53 | 37 | 31 | 30 | 103 | 60 | 19 |

*Mynd 3: Tøl tilsamans av pørum av heiðafuglasløgunum í Skúvoy, sum vórðu tald í gonguteljingini í 2022 og 2023.*

## Niðurstøður

Gonguteljingin gekk sum heild eftir ætlan, meðan tað ikki eydnaðist at telja øll R250 punktini orsakað av mjørka og avmarkaðari manning. Talríkastu fuglasløgini í oynni vóru steinstólpa, grátítlingur, tjaldur og skúgvur. Stórt fall av skúgvi er skrásett í Skúvoy orsakað av fuglakrími í 2022 (Sjúrður Hammer, Umhvørvisstovan, pers.comm.), og tí kann talið enn roknast við at vera væl lægri enn undanfarin ár.

Talið á reiðrandi pørum millum 2022 og 2023 tykist sum heild at vera støðugt fyri flestu sløgini og fyri summi sløg (m.a. steinstólpu, tjaldur og spógva) vaksandi. Tó má eitt ávíst fyrivarni takast fyri samlaðu tølunum frá teljingini í 2022 orsakað av, at hagaparturin Bergið varð taldur síðst í juli. Hetta er seint í bútíðini, og tølini kunnu tá síggja øðrvísi út, enn tey høvdu gjørt um mánaðarskiftið juni/juli, m.a. tí at reiðrandi fuglar og floygdir ungar kunnu reika út um teirra búøki hesa tíðina.

Í hesi frágreiðing eru tølini frá gonguteljingini í 2022 og 2023 ikki samanborin við tey frá undanfarnum árum. Hetta er orsakað av, at tølini sveiggja óvanliga nógv ímillum ár, og hetta kann stava frá ókendum munum í teljingarhátti millum ár. Tí mugu undanfarnu teljingar frameftir nýtast við ávísum fyrivarni og møguliga eftirkannast fyri at tryggja sambæri.

# Tøkk

Ein serlig tøkk til Skúvoyar Kommunu, Poul Osmund Tórarenni, borgarstjóra, og Ingu Tórarenni, sum veittu innivist og hjálp til teljararnar. Tøkk til skúvoyingar, sum komu við góðum ráðum og eygleiðingum til teljararnar. Tey, ið varða av høgunum í Skúvoy, skulu hava takk fyri vælvild.

# Keldur

Olsen, B. (2018). Leiðbeining til teljing av heiðafugli í Skúvoynni á sumri. Havstovan, Tórshavn.

Hansen, L. J., & Aldará, J. (2022). R250 Breeding Bird Count. Tjóðsavnið, Tórshavn.